Ung list í Leikalund

# Kroppurin sum listaverk

**Sterkir litir, nýggj hugskot og øðrvísi vinklar av tí gerandisliga eyðkenna listaframsýningina hjá Jórun Høgnesen í Leikalund í Klaksvík. Ongin ivi er um, at unga listakvinnan av Norðoyri er sín egin, og hóast málningarnir ikki eru so nógvir í tali, tykist tað, sum at teir hvør sær eru á tremur við orku og draga uppaftur fleiri hugskot við sær**

LISTAFRAMSÝNING
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

- Eg má viðganga, at eg kann standa púra hugtikin og stara niður í eitt málingablikk, tá litirnir verða blandaðir. Og so haldi eg tað vera sera spennandi at koma við góðum ráðum um litsamansetingar, tá kundar hava brúk fyri hugskotum. Men burtusæð frá tí, ber tað neyvan til at samanbera mítt arbeiði við tað, sum eg geri mest av í frítíðini, sigur Jórun Høgnesen, sum dagliga starvast í Norðoya Litbúð í Klaksvík. Í frítíðini tekst Jórun nevniliga við list, serliga við at mála, og hesar dagarnar eru nøkur av úrslitunum at síggja á framsýningini í Leikalund.



*Kroppar í nýggjum vinklum og við øðrvísi skuggum er eitt afturvendandi tema á framsýningini hjá Jórun.*

### Kroppar, skuggar og litir

Eitt afturvendandi tema á framsýningini hjá Jórun er mannakroppurin. Fyri Jórun er kroppurin mest at líkna við eitt listaverk í sær sjálvum, eina skurðmynd, sum kann skapast og umskapast alt eftir, hvørjar litir og skuggar, tú leggur á myndina. Men í listaheiminum hjá Jórun eru skuggar ikki bara gráir tónar við ymsari styrki. Á fleiri av myndunum eru skuggarnir endurgivnir í brandreyðum, sólgulum ella havbláum litum, so at kroppurin nærum verður ein eksplosjón av nýggjum útrykkum.

Sum ein mótsetningur til sterku litirnar hongur ein málningur í svørt / hvítum av einum manni í einum rættiliga rukkutum jakka. Ongin ivi er um, at hetta er ein mynd av Jákupi Magnussen, men Jórun greiðir frá, at tað kanska mest vóru skuggarnir á jakkanum á eini mynd, hon sá av Jákupi, sum hon vildi endurskapa. Ætlanin var, at skuggarnir skuldu hava litir, men so langt kom Jórun ikki. Men sjálvt um málningurin í grundini als ikki liðugur, valdi Jórun at taka hann við fyri eisini at vísa ein part av listarligu gongdini og tað øðrvísi úttrykkið, ein mynd hevur, áðrenn litirnir verða lagdir á hana.



*Jakkin hjá útvarpsvertinum, Jákupi Magnussen gav Jórun íblásturin til hendan málningin*

### Eivør - ein fyrimynd

Jórun heldur seg ikki hava nakrar ávísar málarar sum fyrimyndir, men gerst heldur hugtikin av einstøkum málningum ella stílbrigdum hjá øðrum málarum. Hon nevnir, sum dømi, grafiska stílin hjá Edward Fuglø og litirnar hjá Øssur Mohr, men hon leggur seg ikki eftir endurskapa hesi stílbrigdi í sínum egnu málningum. Hinvegin er hon altíð til reiðar at brúka listina hjá øðrum sum íblástur, so hon sjálv kann koma víðari og skapa okkurt nýtt og øðrvísi. Tí er tað kanska ikki so løgi, at Jórun nevnir Eivør Pálsdóttir sum tað nærmasta, hon kemur eini einstakari fyrimynd.

- Har hugsi eg ikki beinleiðis um tónleikin ella málningalistina hjá Eivør, men heldur um hennara tilgongd til tað listarliga arbeiðið. Eivør líkist ongum øðrum, og ger sjáldan tað, vit vænta ella kanska vóna, og tað eri eg øgiliga hugtikin av, sigur Jórun, sum eisni hevur brúkt Eivør sum myndevni í tveimum av málningunum á framsýningini.



*Jórun blandar máling, bæði tá hon er til arbeiðis og í frítíðini. Hon starvast dagliga í málingahandlinum Norðoya Litbúð í Klaksvík*

### Liðug, tá eg eri nøgd

Jórun kundi hugsað sær at brúkt nógv meir tíð uppá listina, men sum er, ber tað ikki til við fullum starvi og nógvum øðrum frítíðarvirksemi. Ætlanin var, at hava nógv fleiri málningar við á framsýningini, men hon fekk ikki stundir til tað, og tí valdi hon heldur at brúka tíðina til at fínpussa tær myndirnar, hon hevði.

– Eg arbeiði ógvuliga seint og kann brúka fleiri vikur uppá ein málning. Tað ber ongantíð til hjá mær at siga frammanundan, nær ein málningur verður liðugur. Hann er liðugur, tá eg eri nøgd, og tað kann taka bæði vikur og mánaðir, sigur Jórun.

Jórun hevur sett sær fyri, at arbeiða við list burturav í framtíðini, og í løtuni roynir hon at kanna ymsar skúlar, sum kundu komið uppá tal. Tað skal helst vera ein skúli, har hon fær høvi at royna seg við ymsum listagreinum, sum til dømis design og leirlist. Hetta hevur hon roynt seg við fyrr, og á hesi framsýn-ingini hevur Jórun eisini nakrar leir- og glaslutir við.

Framsýningin hjá Jórun verður at síggja fram til 6. august.



Systir Ruth, nunna:

# Næstan altíð bangin



*– Eg eri bangin næstan allatíðina. Men onki skal steðga mær í at gera mítt arbeiði. Um eg verði dripin, so góðtaki eg tað, sigur systir Ruth, nunna, ið seinastu 17 árini hevur ferðast kring heimin við standmyndini av Mariu og Jesusbarninum og boðað gleðiboðskapin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Systir Ruth, nunna, hevur seinastu 17 árini ferðast við standmynd sínari av Mariu og Jesusbarninum. Lív hennara hevur fleiri ferðir í vanda, og hon er næstan altíð bangin, men hon vildi ikki givið upp arbeiði sítt fyri allar pengarnar í verðini**

SAMRØÐA
*Ingrid Bjarnastein,*
*ingrid@sosialurin.fo*

Nunnan, systir Ruth, er 63 ára gomul, og seinastu 17 árini hevur hon ferðast kring allan knøttin við síni standmynd av Mariu og Jesusbarninum.

Hon hevur verið í 207 londum í heiminum – henni vantar enn 30, men mál hennara er at náa hesi londini innan tvey ár eru liðin.

Sunnudagin kom systir Ruth til Føroya. Hvussu leingi hon ætlar at steðga er ikki avgjørt enn. Men hon ætlar í øllum førum at vera her á ólavsøku.

### Deyðshóttanir

Systir Ruth ferðast kring heimin fyri at boða gleðiboðskapin. Sjálv er hon katólsk, men hon vitjar allar trúarbólkar. Fyri hana er tað týdningarmesta at koma út við Guds orði, og hevur hon vitjað nógv vandamikil støð ígjøgnum seinastu 17 árini.

– Eg eri fleiri ferðir vorðin hótt og álopin. Í Norðurírlandi varð eg álopin, og onkur hevur eisini stoytt eitrandi tablettir í kaffið hjá mær. Nógvir satanistar hava nógv ímóti mær, og tí fara teir heldur ikki væl við mær, sigur systir Ruth.

Tá hon kemur til eitt nýtt land, fer hon runt við standmyndini á barrir, skúlar, sjúkrahús, fongsul og so framvegis, har hon hittir fólk.

– Tað týdningarmesta fyri meg er at hitta fólk, sum ikki vanliga fara í kirkju. Tey koma til mín, og eg biði saman við teimum, greiðir hon frá. Hon leggur afturat, at fleiri fólk koma til hennara við persónligum trupulleikum. Eitt nú um hjúnarfelaga, pedofili, AIDS, misnýtslu og so framvegis. Tað hon so ger er, at vísa teimum á Harran og biðja fyri teimum.

### Norðurlond best

Nunnan kemur upprunaliga úr Onglandi. Áðrenn hon byrjaði at ferðast kring heimin, arbeiddi hon við brekaðum børnum í London í 30 ár.

Systir Ruth hevur verið í øllum heimspørtunum, og sum sagt, so vantar henni bert 30 lond fyri at hava verið í øllum londunum í heiminum.

– Eg havi verið nógva staðni, og eg havi hitt nógv fólk. Men tað vísir seg, at fólk í Norðanlondum vanliga eru meira fólkalig og hava virðing fyri einum enn aðrastaðni. Til dømis í London rópa og banna fólk eftir mær, har eg komi, og eg havi havt nógvar keðiligar upplivingar, sigur nunnan.

Tað var tá nunnan hevði verið í Íslandi, at fólk søgdu við hana, at hon átti at farið ein túr til Føroya, tí fólkið í Føroyum var ógvuliga kristið.

– Føroyingar eru ógvuliga fólkaligir, og tað er fá støð í heiminum, at fólk eru soleiðis, sum her. Tað ber eisini til at fara inn í eina kiosk í Føroyum, uttan at allar hillarnar eru fullar av pornografiskum bløðum. Tað er fantastiskt, sigur hon og flennur. Stóra standmyndin av Mariu og Jesusbarninum stendur á borðinum. Hetta er onnur standmyndin systir Ruth hevur gingið við. Ta fyrru standmyndina gav hon til eina kvinnu, ið skuldi byggja eitt altar, og sum fegin vildi hava standmyndina hjá nunnuni við.

### Onki forðar

Arbeiðið hjá systir Ruth kann ikki gerast sørt vandamikið til tíðir. Men í Føroyum kennir hon seg trygga.

– Eg eri bangin næstan allatíðina. Men onki skal steðga mær í at gera mítt arbeiði. Um eg verði dripin, so góðtaki eg tað. Tað eru so nógv fólk, ið eru vorðin dripin fyri teirra trúgv, og verði eg ein av teimum, so verður tað bara so.

Systir Ruth gongur ikki í nunnuklæðum, sum vit vanliga kenna tey. Hon gongur í púra vanliga klæðum. Orsøkina til hetta sigur hon vera, at hon hevur verið og vitjað so nógv lond, har hon ikki hevði sloppið inn, um hon var í nunnuklæðum.

### Vitjar illa stødd

Á ferðum sínum í teimum ymsu londunum vitjar systir Ruth øll sløg av fólki. Vaksin og børn, og eisini ferðast hon í teimum sonevndu »red light districts«, har skøkjurnar halda til.

– Eg síggi hesar naknu genturnar sita í vindeyganum, og so fari eg til teirra at tosa við tær, og tær greiða mær frá sínum søgum. Hvussu teimum er lovað eitt gott arbeiði og góðar umstøður, og so enda tær soleiðis. Tað er syrgiligt, heldur nunnan.

Tær mongu ferðirnar verða rindaðar av pengunum, ið systir Ruth fekk fyri at selja húsini hjá mammuni. Í London eru harafturat nógvir møguleikar at ogna sær ein ókeypis flogferðaseðil uppá, og hesar roynir hon at gagnnýta til fulnar.

### Ferðast í Føroyum

Systir Ruth hevur ongantíð eina fasta skrá, tá hon kemur til eitt land. Og hetta er eisini galdandi nú, hon er komin til Føroya.

– Eg vil vera her á ólavsøku. Ferðin er løgd soleiðis til rættis, at eg kundi vera her til tjóðarhátíð tykkara. Eg haldi, at tað er ein vakur siður, sum vísir aftur á tykkara kristnu røtur.

Nær hon fer avstað aftur, er tískil ikki fastlagt enn. Fyrst og fremst ætlar hon sær at ferðast kring landi við standmynd sínari, og tosa við fólk.

### 30 lond á 2 ár

Nú vanta bert 30 lond, so hevur systir Ruth vitjað øll londini í heiminum. Føroyar eru hennara 207. land.

– Eg hevði viljað havt eina aðra nunnu við mær. Fyri tað fyrsta, so merkir tað selskap, og fyri tað næsta, so er tað ikki eins vandamikið, sum tá ein er einsamallur.

Um tvey ár ætlar systir Ruth at gevast við at ferðast kring heimin, og mál hennara er at hava nátt tey seinastu 30 londini innan ta tíð.

– Eg havi verið kring helvtina av Afrika, í størsta partinum av Asia og mær vantar framvegis nøkur lond í Suðuramerika. Tey vandamestu londini, sum eitt nú Irak, Afghanistan og Saudi Arabia, ætli eg mær at vitja seinast, tí har eri eg bangin fyri at fara.

Spurd um hví hon hevur valt hetta slagi av arbeiði svarar hon:

– Eg byrjaði at lesa Opinberingina, og har sá eg, at nógv av teknunum, ið eru nevnd har eru komin nú.

Hon sigur, at millum annað er álopið á World Trade Center lýst í kapitli 18 í Opinberingini.

Við arbeiðnum kemur systir Ruth í samband við fleiri milliónir av menniskjum, tí tað er ofta, at hon er at síggja og hoyra í sjónvarpi, útvarpi og bløðum. Og eisini tá gingið verður runt, so hittir hon hundraðtals fólk.

– Hevði tað ikki verið fyri míni trúgv, so hevði eg sjálv verið deprimerað. Eg lurti eftir trupulleikum allan dagin. Men mítt arbeiði gevur mær stóra gleði, vón og troyst. Tað týdningarmesta í mínum lívið er Jesu kærleiki, og um eg kann vísa menniskjum á hann, so eri eg gleð. Serliga nú, tá verðin er háttað soleiðis, sum hon er í dag.

– Mítt arbeiði er hart. Men eg vildi ikki givið tað upp fyri allar pengarnar í verðini, sigur 63 ára gamla systir Ruth úr London.